norden · Götu Kommuna · Frælsi · ATLANTIC AIRWAYS · kontoIN



G! FESTIVAL ER ERRIN AT BJÓÐA FÖROYA FÓLKI:

# EUROPE

EUROPE eru störstu rokkhetjurnar, sum norðurlond nakrantíð hava fostrað. Teir hava ligið á fyrsta plássinum á hittlistunum í 26 londum í senn, og til konsertina um milleniumskiftið í Stockholm savnaðu teir 500.000 fólk! EUROPE eigur eyðkennislögini fyri eitt heilt tíðarskeið í tónleikinum – Carrie, Rock the Night, Cherokee – ja, í roynd og verðu eiga teir sangin, sum eitt heilt ættarlið minnist best av öllum –The Final Countdown.

Akkurát sum við ABBA er tónleikurin hjá EUROPE ódeyðiligur – og nú eru EUROPE við at fáa tann heiður, teir hava uppiborið. Bólkar sum The Darkness og nú seinast Wig Wam benda á tað sama: Tað er aftur loyvt at dáma tann væl spælda og melodiösa guitarrokkin, eftir at hesin tónleikur í nökur ár mestsum var settur í skammikrók.

Júst afturkomnir av heimstúri á útvaldum spælistöðum í USA og aðrastaðni við framúr góðum ummælum, eru EUROPE aftur her – betri enn nakrantíð. Tendraðir og svangir sum tá teir byrjaðu og við originalu legendarisku manningini, Joey Tempest, John Norum, Ian Haugland, Mic Michaeli og John Levén.

At ein bólkur á hesum tignarstigi velur at leggja leiðina framvið hjá okkum í Föroyum er ein stórur heiður. Saman við hinum allarbestu og kendastu norðurlendsku og föroysku növnunum eru EUROPE við til at skapa feitastu tónleikaskrá, sum higartil hevur verið sædd í Föroyum: Nephew[DK],Darude[FIN], Hjálmar[ISL], Blue Foundation[DK/UK/JPN], Beats and Styles[FIN], Teitur Lassen Band, 200, Makrel, Týr, Martin Joensen, Stanley Samuelsen, Afenginn[DK/FIN/POL], DJ Slow[FIN], Sic, Gestir, Braquet, og onnur, pluss felagssangur, spælimenn, fólkatónleikur og annað.

Vilt tú verða partur av eini framúrskarandi og hjartanemandi uppliving, so er at skunda tær, tí í mesta lagi 5.000 atgongumerki verða seld tilsamans. Fylg við á www.gfestival.com so hvört sum skráin og tilboðini taka endaligt skap. Tú mást fara.

Atgongumerki til G! 2005 eru at fáa á Posthúsum, Kunningarstovum og Shellstöðum kring landið, og online á www.kontoin.fo og www.kall.fo

# G! FESTIVAL™

22.-23. JULI – TÚ MÁST FARA

nörd